**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.**
**Bygdarráðsfundur tann 28. september 2015, kl. $19^{00}$.**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Jógvan Emil Nielsen, Malan Stórá, Durita á Heygum, Herit Magnussen og John Zachariassen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Hilbert Elisson tann 28. september 2015 boðað frá, at honum barst frá at møta á fundinum. Tiltakslimurin Øssur Christiansen fekk fundarboð sama dag, men fekk ikki møtt. Síðani fekk tiltakslimurin Jógvan Emil Nielsen fundarboð, og játtaði at møta á fundinum.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.
Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Jógvani Emil Nielsen sum tiltakslimur.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 147**
Tilmæli frá Teknisku deild um ognartøku av matr.nr.: 73a.
J.nr. 2013-089

**Viðv. 147**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 148**
Tilmæli frá Paula T. Petersen, borgarstjóra, um framløgu/1. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2016.
J. nr. 00.30.10-S02-1-15

**Viðv. 148**
Uppskotið til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2016 varð lagt fyri bygdarráðið til 1. viðgerð.

**Mál 149**
Tilmæli frá Paula T. Petersen, borgarstjóra, um framløgu/1. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlan fyri Heimatænastuna fyri VEKS fyri 2016.

**Viðv. 149**
Uppskotið til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2016 varð lagt fyri bygdarráðið til 1. viðgerð.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.00

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Hilbert Elisson Herit Magnussen

Durita á Heygum Malan Stórá